Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Høgna Traðará til minnis

**f. 17. november 1980 d. 27. juni 2003**

Góði Høgni.

Løtur eru í lívinum, har ein kennir tað, sum um alt steðgar upp. Tíðin, lívið, veruleikin og meiningin. Har ein so brennandi ynskir, at tað ber til at spola lívstráðin eitt lítið sindur aftur, og so seta í gongd av nýggjum og leypa um hendingina, sum fekk alt at steðga upp. Ein tílík løta var hendan vakra summarmorgunin, út móti morgni, tá dagurin var um at fáa lív, og vit fingu lagnutungu boðini um, at tú hevði fingið sera álvarsligan løst í eini ferðsluvanlukku. At tað stóð um lív, og at vánirnar vóru lítlar og ongar. Hetta var uttan fyri okkara fatanarevni og so púra meiningsleyst. Ungur og spelkin. Á gáttini til at byrja lívið. Við greiðum framtíðarætlanum. Ávegis uttanlands at leita tær víðari útbúgving og leggja lunnar undir vaksnamannalívið. Og so við eitt høgg, sá alt út til at liggja í skeljasori.



Eina viku mátti tú so liggja í andaleypi. Har vit stúrdu og vónaðu, hvørt um annað. Inniligu ynskini um at alt skuldi spæla væl av, og so bivandi óttin fyri at títt sprelska lyndi skuldi verða fangi í kryplum hylki. Hesir dagarnir vóru tungir. Meiningsloysi kendist so altumfatandi. Men vit fingu høvi til at hava teg millum okkum nakrar dagar afturat og royndu at siga tær alt, sum vit høvdu á hjarta. Tú skuldi havt verið til seinastu próvtøkuna á Handilsskúlanum. Ein glotti hómaðist tann dagin floksfelagar komu við húgvuni, sum tey so fegin vildu hava, at tú eisini fekst á høvdið. Tann dagin tú skuldi havt verið á Kambsdali eftir próvnum, vart tú fyri seinasta bakkkastinum, og seinasta vón okkara brast. Morgunin eftir sovnaði tú stillisliga fyri seinastu ferð. Vit fingu møguleikan at verða hjá tær tá og siga tær farvæl. Tað hevði týdning fyri okkum, at vit fingu tað høvið.

Brot úr lívsins filmi hava verið spæld umaftur og umaftur seinastu mánaðirnar. Brot, har vit høvdu leiklut saman. Var ikki meir enn stór smágenta, tá tú var føddur og átti tú beinanvegin stórt rúm hjá okkum øllum. Tað var á ein hátt, sum at hava fingið ein lítlabeiggja afturat. Tín lutur allan vegin frá smádrongi til vaksnan mann. So sprelskur og samstundis so spakur. So lítil og spinkul og nú so stórur og prúður. Frá tú vart trillaður um geilar í bygdini til mín fyrsta túr út um landoddarnar, har tú eisini vart við. Luturin frá at vera lítlibeiggi til tað stóra systkinabarnið hjá børnum okkara og gubbi at tí yngsta. Tann stóri, sum tey sóu upp til. Allar hesar myndirnar, sum vit nú mugu noyðast við at minnast, halda fastar og leggja okkum betri í geyma, so tær ongantíð verða gloymdar. Sum vit skulu geva víðari til tey, sum eru ov lítil at minnast.

At vera til jarðarferð hjá unglinga er andsøgn í sær sjálvum. Roynt varð at gera hesa lagnutungu løtuna í tínum anda. Tung var hon, og tung vóru fetini í fylginum seinasta túrin í bygdini. Lívgandi var tann stóra samkensla og tann stóru skarði, sum tóku tungu fetini saman við okkum.

Orðini tykjast so fátøk í hesum meiningsloysi. Saknurin svárur hjá okkum, men ongastaðni so svárur sum hjá tykkum, sum hava mist son og beiggja. Góða Sunrid. Løturnar kendust so høpisleysar, óveruligar og tó so nærar. Í veikleikanum er tað at styrkin skal finnast.

At finna gerandisdagin aftur, lata lívið halda áfram og ásannað, at restin av verðini heldur á, sum um onki var hent, kann tykjast so órættvíst. Men tað er lagnunnar vegur og nakað av linna finna vit í orðunum hjá ókenda yrkjaranum, sum prestur hevði frammi við jarðarferðina, og har orðið verður latið honum, sum farin er:

*Deyðin er ikki tað seinasta, eg eri bara farin um sýnina.*
*Eg eri eg, og tú ert tú. Tað, sum vit áður vóru fyri hvør øðrum, tað eru vit enn.*
*Nevn meg við navni, nýt mítt yndisnavn, práta við meg um leyst og fast, sum vit altíð gjørdu.*
*Lat røddina vera hina somu, hóast sorg og sakn.*
*Flenn soleiðis sum vit vóru von at flenna saman at onkrum skemtiligum.*
*Hugna tær, brosa, hugsa um meg, bið fyri mær.*
*Lat mítt navn framvegis hoyra upp í okkara húski.*
*Tala um meg natúrliga, ikki við gráturødd.*
*Lívið er framvegis dýrabært, tað er, eins og tað altíð var, tað heldur á øld eftir øld.*
*Deyði og lív hoyra saman.*
*Hví skuldi eg farið úr huga, um eg fór úr eygsjón?*
*Eg bíði bara eftir tær, um eina stund, onkustaðni her í nánd, aftan fyri sýnina.*

Hvíl í friði, góði Høgni.
Takk fyri alt !

**Margit við familju**

# Pól Skarðenni í Smiðjuni

Í dag, 14. november kl. 15, letur Pól Skarðenni listamaður upp málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Pól er klaksvíkingur og útbúgvin verkfrøðingur. Seinastu tólv árini hevur hann arbeitt við at designa og byggja dekoratiónir á djóragørðum í Hálandi, Svøríki og Danmark. Fyri hálvum ári síðan flutti hann heim aftur og arbeiðir nú sum listamaður í Føroyum. Hann býr í Vatnsoyrum.

Á framsýningini eru umleið 30 oljumálningar sum fyri tað mesta eru landslagsmyndir.

Framsýningin letur upp í dag kl. 15 og er opin til og við týsdagin 18. november, allar dagarnar frá kl. 15-18.



Pól Skarðenni við oljumálningi av Kvívík

Mynd: Jens Kristian Vang

Landsins besta bilaleiga



Ring: flogvøllurin 212 765 ella Tórshavn 217 535
Johs. Berg · Staravegur 1 · 100 Tórshavn
AVIS We try harder



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Sybilla Høgnesen 70 ár



Fríggjadagin 14. november fyllir Sybilla Høgnesen, vanliga nevnd Billa, í Klaksvík. 70 ár.

Foreldur hennara vóru Petra og Hugo Gardar.

Í 1956 giftist hon við Hjalmar Høgnesen, tey eiga fimm børn, tríggjar synir og tvær døtur, ið búgva í Klaksvík, uttan tann elsta sum býr í Hvannasundi.

Sum ung arbeiddi Billa tvey ár í Íslandi. Var heimaarbeiðandi til børnini vóru vaksin, arbeiddi so nøkur ár sum flakakvinna á Kósini.

Billa hevur sitið í nevndini í Húsmøðrafelagnum, og var við at seta Húsarhaldsskúla Føroya á stovn.

Síðstu árini hevur hon verði virkin í felagnum Hugna, og hvønn týsdag samlast tey og hava eina hugnaliga løtu.

Billa er ófør at ganga sær túrar og støkka inná gólvið hjá vinum og kenningum.

Vit ynskja Billu hjartaliga tillukku við 70 ára degnum, og nógv góð ár framyvir.

Dagurin verður hildin hjá dóttrini Gunhild Arge, Garðsendi 24, Klaksvík, frá kl. 16 fríggjadagin

## Tummas Jacob á Løgmansbø á ting



*Tummas Jacob á Løgmansbø*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

11. november tók Tummas Jacob á Løgmansbø í Miðvági sæti á tingi fyri Jørgen Niclasen, sum er í farloyvi.

Tummas Jacob er 53 ára gamal og miðvingur, sonur Johild, f. Hansen, ættað úr Sørvági, og John Frits á Løgmansbø úr Miðvági.

Hann er útbúgvin rørleggjari og skipari og hevur siglt í nógv ár. Síðan 1994 hevur hann verið útgerðarmaður og rikið reiðaríið Vest-Line í Miðvági, sum hann eigur saman við øðrum. Teir eiga línuskipini West Freezer og Presttanga.

Tummas Jacob stillaði upp fyri Fólkaflokkin í Vágum til seinasta val, og er hann triði maður á listanum í Vága valdømi. Hetta er fyrstu ferð at hann situr á løgtingi.

Hann er giftur við Elly Dam á Løgmansbø, sum er úr Sandavági, og tey eiga fýra børn.

✝

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at elskaða mamma, omma og langomma okkara

**Helga Mohr Poulsen**

Tórshavn, ættað úr Vestmanna,
búsitandi í Syðrugøtu

andaðist á Landssjúkrahúsinum
týsdagin 11. november 2003, 84 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
leygardagin 15. november 2003 kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*

**Herbjørg, Glory, Mourentsa og Jóan Hendrik**

## Dagurin

**14. november. Fríðrikur.** Hildið verður, at her verður sipað til ein biskup í Utrecht, sum varð myrdur av leigudrápsmonnum í 838. Keisarinnan Judita hevði sent teir, av tí at Fríðrikur hevði roynt at fáa keisaran til at skiljast frá henni.

Navnið er tað upprunaliga gotiska *Friqareikeis*, og merkir *friður* og *harri*.

*Johan Hendrik Schrøter doyði hendan dagin í 1851.*

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

# Minningarorð um Hans Peter Weihe, advokat

Leygardagin 8. november andaðist Hans Peter Weihe, advokatur, eftir at hava verið sjúkur í drúgva tíð.

Hans Peter og eg komu at kennast á heilt ungum árum miðskeiðis í fimtiárunum, og árini í Keypmannahavn frá 1957 til 1964 varð knýtt eitt vinarlag okkara millum, sum kom at halda fram tá vit aftur hittust her í 1973.

Hugur hansara stóð frá byrjan til sakføraravirki, og eftir løgfrøðisligt embætisprógv í 1964 bleiv hann advokatfulltrúi í Norðursælandi. Seinni bleiv hann medinnihavari av virki í Keypmannahavn og var tey seinastu mongu árini seniorinnihavari av hesum virki og longu frá 35 ára aldri við møtirætti til hægstarætt.

Hans Peter var ein maður, sum fólk beinanvegin fingu virðing fyri. Hann var rættlinjaður sum fáur, lítillátin, arbeiðssamur, hóvligur og vinaligur. Og hartil var hann høgt virdur sum advokatur millum starvsfelagar her og heima. Hann hevði nógvar tungar sakir, ikki minst sum verji í revsimálum. So seint sum í summar møtti hann í hesum eginleika í hægstarætti, hóast sjúkan av álvara hevði fingið tamarhald á honum.



Hóast hann hevði búð meginpartin av lívinum í Danmark, høvdu Føroyar eitt stórt pláss í hjarta hansara. Og sum advokatur fyri føroyingar her niðri og heima hevði hann eitt sera gott umdømi. Hann førdi sakir fyri landsstýrið og aðrar stovnar og var umframt sera nógv brúktur av føroyingum her niðri. Mangan hjálpti hann fyri lítið og lætt, tá hann visti at t.d. ung fólk høvdu avmarkað ráð at gjalda fyri slíka tænastu.

Tær álitisuppgávur, hann fekk frá almennu Føroyum í sambandi við Fíggingargrunnin, kanningar í samb. við bankamálið og loksins sum løgfrøðisligur ráðgevi fyri § 19 nevndina, veit eg, at hann var sera glaður fyri. Fáur hevði loyst hesar uppgávur betur og meira samvitskufult enn hann.

Eg hevði nógv samband við Hans Peter í hesi 30 árini, síðani eg kom aftur til Keypmannahavnar, bæði sum persónligur vinur og sum góður ráðgevi í nógvum høpi. Ikki minst skal eg nevna tey mongu árini vit sótu í nevndini fyri Føroyahúsgrunnin, og saman við øðrum stríddust fyri at fáa eitt Føroyahús í Keypmannahavn. Hann luttók trúliga øll árini, eisini sum løgfrøðiligur ráðgevi, uttan nakrantíð at fáa eina krónu í samsýning. Hansara loyalitetur og persónligi integritetur var nakað, sum ein sjáldan ella aldri upplivir. Bert kundi ein ynskt, at alt hetta stríð, hann átók sær ókeypis, endaði á ein meira virðiligan máta.

Tá vit hildu seinasta ársskifti saman við Hans Peter og Solveig, vistu vit lítið, at hetta kom at verða seinasta ferðin, vit komu saman í slíkum høpi. Hann var tá í viðgerð og útlitini fyri heilsubót vóru góð. Men soleiðis skuldi tað ikki ganga.

Álvarsligu sjúku sína tók hann, róligur sum hann var, á ein so virðiligan og opnan hátt, sum bert fá vildu gjørt tað. At hann visti hvagar leiðin gekk, fingu vit fatan av fyri mánaðum síðani, tá hann spurdur um heilsuna segði, at hann var glaður fyri at børnini vóru tilkomin og kláraðu seg sjálvi.

Vit eru nógv, sum syrgja yvir Hans Peter, men allarstørst er sorgin hjá Solveig, sum eisini hevur sítt at dragast við, og hjá børnunum Ninu, Hans Mortani og Johan Henrik við familjum teirra. Gævi tit fáa styrki til at koma yvir stóra saknin.

Við hesum orðum vil eg lýsa frið yvir minnið um vinmannin og góða samstarvsfelagin Hans Peter.

**Tryggvi Johansen**